


# Statoil umhugsar stórkeyp

**Jan Müller**

10.01.2014 - 23:22

Oljan.fo

Tað er nógv, sum bendir á, at stórt virksemi er innanhýsis í Statoil í hesum døgum. Bloomberg skrivar, at Statoil kannar møguleikarnar fyri einum stórum altjóða uppkeypi.

Felagið hevur leingi havt ætlanir um at keypa eitt altjóða felag, men nú, eftir at Norra hevur fingið nýggja stjórn, eru hesar ætlanir nærri enn nakrantíð.

Sjálvt um Statoil er skrásett á altjóða keypsskálunum bæði í Oslo og New York, so eigur tað almenna enn 67% í Statoil. Nýggja stórnin hevur nevnt, at tað kann hugsast, at tann almenni parturin kann koma niður á góð 50 prosent. Hesi partabrøvini, sum tað almenni selir seg niður við, kunnu nýtast í einum møguligum uppkeypi.

Nevnt verður, at feløgini, sum Statoil umhugsar at keypa, eru millum onnur Anadarko, Tullow Oil og BG Group. Onkrir miðlar vilja enntá vera við, at Statoil umhugsar at keypa stóra amerikanska felagið ConocoPhilips. Um so er, so verður Statoil eitt av heimsins

stórstu feløgum. Tað hevur ikki eydnast hvørki norskum ella altjóða miðlum at fáa nakrar viðmerkingar frá Statoil.

Statoil hevur fyrr gjørt stór uppkeyp. Millum annað keypti felagið Norsk Hydro fyri nøkrum árum síðani.

Statoil riggar í løtuni til at bora tveir brunnar á føroyska landgrunninum saman við fleiri stórum altjóða oljufeløgum eitt nú heimsins størsta felag, ExxonMobil.